# Restorff's missir metstóran ordra

**Føroyingar missa andlit, og Restorff's bryggjarí missar ein metstóran ordra. Tað sigur Johan »Hot« Mortensen, stjóri í Restorff's bryggjarí, nú forðað verður Norrønu at skeinkja á stóru fiskivinnu-stevnuni í Runavík**

FISKIVINNUSTEVNA
*Ingi Rasmussen*

– Hetta er ein landaskomm! Hyklarí í ytsta potensi.

Johan »Hot« Mortensen, stjóri á Restorff bryggjarí, er alt annað enn fegin um, at Norrøna, nú brádliga er turrløgd.

Bryggjaríið hevur gjørt avtalu við fiskivinnustevnuna um, at ølið frá Restorff er tað einasta, sum verður selt umborð á Norrønu. Føroya Bjór er koyrt í land, og hetta er ein søguliga stórur ordri hjá bryggjarínum úr Havn, tí túsundtals gestir vitja á stevnuni. Nú kann ølið tað sama stoytast fyri borð.

– Vit hava staðið á høvdinum síðstu dagarnar fyri at stoyta øl í føt til hesa stevnuna, men nú verður hetta av ongum. Tað er pínligt. Bæði fyri okkum og fyri nógvu stevnuluttakararnar, sigur ein heitur Johan Mortensen, stjóri í Restorff's bryggjarí.

## Missa andlit

Seinasta ár vóru ein 7000 vitjandi, og1000 teirra vóru útlendingar. Í ár er ikki óhugsandi, at tað vera útvið 10.000 vitjandi, og umleið 500 av teimum búgva umborð á Norrønu. Men skulu tey hava eitt glas, mugu tey altso velja ímillum mjólk, sodavatn og kanska eina veika øl.

– Føroyingar missa fullkomiliga andlit av hesum. Hetta er nógv tann største altjóða stevnan, sum føroyingar skipa fyri, og so ber ikki til hjá teimum útlendingum, sum ómaka sær higar at fáa eina øl. Tað er beinleiðis pínligt, sigur Johan Mortensen.

Sum Sosialurin skilir, so arbeiðir løgreglan við málinum. Skal Norrøna brúkast sum hotelskip, ið skeinkir, so skulu bæði matstovuloyvi og skeinkiloyvi vera í lagi. Men bara matstovuloyvi er fingið, sigur Kári Thorsteinsson av politistøðini í Havn, sum hyggur eftir, at loyvini verða yvirhildin.

## Einasta í verðini

Í fjør bar til. Tá var fiskivinnustevnan gjørd til eina afturlætna samkomu, sum skonkt varð fyri. Í ár hevur ljóðað, at stevnan hevði funnið eitt hol í lógini. Norrøna skuldi selja gløs, sum fiskivinnustevnan síðan skonkti rúsandi løg í. Men hetta er at sníkja seg undan lógini, halda myndugleikarnir.

– Eg veit ikki, um vit kunnu lasta fyrireikararnar fyri, at teir ikki hava fingið síni viðurskifti í rættlag. Tað er ómetaliga seint at koma dagin fyri stevnuna og siga, at tað ikki má skeinkjast. Hetta er pínligt, og útlendingar fara at flenna eftir okkum. Hetta er einasta stevnan í verðini, har tað ikki ber til at fáa sær eina øl um kvøldið, sigur Johan Mortensen.

## Politiskt hykl

Tá til stykkis kemur, er tað hvørki fútin ella fiskivinnustevnan, sum skal lastast, heldur bryggjaríið. Tað eru føroysku politikararnir, sum ikki eru sína uppgávu vaksnir.

– Rúsdrekkalógin er 100% tápulig, men ongin politikari torir at nerta við hana. Teir eru so bangnir fyri at missa sínar atkvøður, at teir lata bara standa til, hóast ein slík stevna vísir, hvussu langt úti vit eru í Føroyum. Hetta er rein forðing av føroyskum vinnulívi, sigur Johan Mortensen.



*– Rúsdrekkalógin er 100% tápulig, men ongin politikari torir at nerta við hana. Teir eru so bangnir fyri at missa sínar atkvøður, at teir lata bara standa til, hóast ein slík stevna vísir, hvussu langt úti vit eru í Føroyum. Hetta er rein forðing av føroyskum vinnulívi, siga Johan Mortensen og Óla Svenn Nolsøe*




*Tað er ikki loyvt at skeinkja sterkari enn veikt øl á Norrønu, so leingi hon er flótandi hotellskip á stóru fiskivinnumessuni*
*Mynd: Jens K. Vang*

# Norrøna turrløgd

**Ruðulleiki valdaði umborð á Nørruna fyrsta stevnudagin á North Atlantic Fish Fair. Útlendingar og føroyingar í hópatali gista umborð, men støðan varð so ógreið, at skiparin setti forboð fyri at skeinkja fyri gestunum. Sum skilst hevur fútin givið fyrireikarunum forboð ímóti at skeinkja sterkt á stevnuni, tí teir hava onki skeinkiloyvi**

FISKIVINNUSTEVNA
*Ingi Rasmussen*

Norrøna liggur við bryggju í Runavík. Nýggi stoltleiki føroyinga er hotellskip á stóru fiskivinnumessuni, North Atlantic Fish Fair, har útlendingar og føroyingar í 1000-tali vitja.

Við eina slíka stevnu hoyrir vanliga vín og øl afturvið einum betri bita um kvøldarnar, tá fólk taka sær av løttum og sodna dagsins meldur og fiskaprát.

Men í ár er Norrøna turrløgd. Fútin hevur boðað fyrireikarunum frá, at skeinkjast má ikki við rúsandi løgi undir nøkrum umstøðum. Sum skilst hevur onkur meldað North Atlantic Fish Fair fyri fútan, tí tað hevur ljóðað, at Norrøna ætlar at skeinkja, hóast hon ikki hevur fingið serliga skeinkiloyvið, sum krevst.

## Onki loyvi

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa orðið á fútan, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Kári Thorsteinsson, loyvisleiðari á politistøðini í Havn, sigur við Sosialin, at Norrøna hevur fingið matstovuloyvið upp á pláss, men hon hevur ikki loyvi at skeinkja, so leingi hon liggur við bryggju og er hotellskip.

Hann kennir onki til, at Norrøna er meldað til fútan, sum tað hevur ljóðað, men hann vísir á, at løgreglan hevur skyldu til at tryggja sær, at loyvini eru í lagi, áðrenn skonkt verður alment.

Rúni Joensen, aðalstjóri í løgmálaráðnum, er formaður í serligu nevndini, sum veitir skeinkiloyvi. Og hann ger púra greitt, at Norrøna ikki kann skeinkja fyri sínum gestum.

– Í Føroyum hava vit ikki tann møguleika at veita skeinkiloyvi til einstøk tiltøk, sum tey hava í londunum kring okkum. Í Føroyum verða loyvini býtt út í ávísum tali til ymisku økini og eru galdandi fyri fýra ár í senn. Ávísar treytir skulu lúkast, men í lógini er ikki hugsað um, at vit kundu fáa eitt flótandi hotellskip, sigur Rúni Joensen.

## Politiskur vilji

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður við vinnumálum, hevur arbeitt við einum uppskoti, sum miðaði ímóti, at skeinkiloyvi kundu gevast til einstøk tiltøk. Tað var lagt fyri landsstýrisfund, men júst tann heimildin, varð tikin útaftur.

Uppskotið var kortini lagt fyri løgtingið. Løgtingsfólk vórðu kunnað um, at hetta merkti, at Norrøna ikki fór at fáa skeinkiloyvi til slík tiltøk. Men ongin politikari ynskti nakra broyting.

– Bæði landsstýri og løgting ynskja, at tað skal vera soleiðis, og tí er púrt onki at gera hjá Norrønu. Hon kann ikki fáa loyvi at skeinkja, sum lógin er orðað, sigur Rúni Joensen.

# Kreppufundur um virksemið umborð á Norrønu

**Viðurskiftini við hotel-og resturatiónsvirksemi num umborð á Norrønu eru komin uppá pláss**

FISH FAIR
*Vilmund Jacobsen*

Mánakvøldið, tá ið seinasta hond varð løgd á fyrireikingarnar til North Atlantic Fish Fair stevnuna, tók ivi seg upp, hvørt ein partur av virkseminum, sum verður umborð á Norrønu, ið liggur við bryggju í Saltangará sum hotel-skip, er lógligt ella ikki.

Nógv fundarvirksemi var í Havn mánakvøldið eftir at tað frættist, at fútin hevði tikið málið upp, tí ivi er um hetta virksemið.

Mánakvøldið var løgreglan umborð á Norrønu og kannaði viðurskiftini.

## Meldað ella ikki

Annar av fyrireikarunum, Andrias Jacobsen, sum vit hittu á framsýningarøkinum mánakvøldið, segði seg hava skilt, at onkur hevur meldað ætlaða virksemið, men hann visti ikki, hvør hevur tikið hetta stigið. Hann visti heldur ikki við vissu at siga, um málið er meldað - ella, um fútin hevur tikið hetta málið upp av sínum eintingum.

Soleiðis, sum Sosialurin hevur skilt, vóru hin fyrireikarin, Áki í Skemmuni og býráðsformaðurin í Runavíkar kommunu, Rodmundur Nielsen saman við sakføraranum, Kristiani Andreassen, á fundi í Havn við Smyril Line.

Smyril Line, sum rekur virksemið, meðan Norrøna liggur við bryggju í Saltangará, vil – sum skilst – ikki váða, at umdømi hjá skipinum kemur í vanda, og tí vil felagið, at virksemið, sum fer fram umborð, ikki er í stríð við lógina.

Mánakvøldið sá út til, at sjálvt hotel-og resturatiónsvirksemið umborð á Norrønu bleiv av ongum, men týsmorgunin skiltist, at hesi viðurskifti vóru komin uppá pláss.

Trupulleikin var, at Smyril Line hevði ikki søkt um at sleppa at reka hetta virksemið, meðan skipið lá við bryggju í Saltangará, tí felagið metti, at tað var ein sjálvfylgja, at hetta var í lagi.

## Nógv virksemi

Hvussu verður við skeinking umborð á Norrønu, meðan North Atlantic Fish Fair verður hildin, var ikki greitt, tá ið Sosialurin fór til prenttilgerðar í gjár.

Arbeitt verður á nógvum »frontum«, soleiðis at viðurskiftini, sum hava tikið seg upp, ikki skulu órógva hesa altjóða fiskivinnu- og alistevnu, sum nú á øðrum sinni verður hildin í Føroyum.

Ólavur Hovsgarð, skipari á Norrønu, hevur gjørt greitt, at eingin skeinking verður umborð á Norrønu, fyrr enn øll viðurskifti í hesum sambandi eru komin uppá pláss.

Jenis av Rana:

# Eg havi ikki meldað

**Eg arbeiði ikki á so lágum støði sigur Jenis av Rana. Mánakvøldið var hann annars lagdur undir at hava meldað teir, sum fyrireika fiskivinnustevuna fyri at skeinkja ólógliga**

FISKIVINNUSTEVNA
*Áki Bertholdsen*

**Sosialurin í Runavík:** Eg havi ikki í hvussu so er ikki melda nakan.

Jenis av Rana avsannar, at hevur nakar meldað fyri ólógliga skeinking umborð á Norrønu í sambandi við fiskivinnustevnuna, er tað í hvussu so er ikki hann.

Annars gekk sum rótasúpan í Runavík mánakvøldið, at tað var Jenis av Rana, sum hevði meldað og at tað var orsøkin til, at Løgreglan legði upp í ætlanin at skeinkja umborð á Norrønu.

Í gjár gekk eitt sindur strilti at fáa vátta, at málið varð meldað, ella um løgreglan legði upp í avsínum eintingum, men Jenis sigur, at hann hevur so onki við tað at gera.

– Eg arbeiði ikki á so lágum støði, sum hatta. Vildi eg lagt meg út í hatta málið, so hevði eg gjørt tað á annan hátt. So hevði tað verið gjørt í politiskt, tí tað er í politikki, at eg arbeiði.

Hann sigur, at er tað ólógligt at skeinkja umborð á Norrønu, væntar hann, at Løgreglan tekur sær av tí sjálv.

Ger hon ikki tað, skulu teir eisini fáa loyvi skeinkja fyri sær, tí so fer hann heldur ikki at blanda seg uppí.

Hann sigur annars, skal skal spurningurin um skeinking umborð á Norrønu verða so avgerandi partur av fiskivinnustevnuni, sum tað er gjørt til, heldur hann, at hon er á einum so lágum støði, at hon hevur ikki uppibotið at verða nevnd altjóða stevna.

Men herfyri var ætlanin at broyta rúsdrekkalógina so at tað skuldi bera til at skeinkja á ávísum tiltøkum. Er tað ikki rætt, at tit settu samonguna í veð fyri at forða fyri tí?

– Nei tað er ikki rætt og tað var eisini óneyðugt at hugsa so langt. Veruleikin er, at í fjør legði Bjarni Djurholm hetta uppskotið fyri tingið.

Eftir uppskotinum skuldi tað vera loyvi at skeinkja á ávísum tiltøkum. Treytin var, at onkur, sum hevði skonkiloyvi frammanundan, skuldi standa fyri skeinkingini.

Tá søgdu vit okkara hugsa um tað. At hann so aftur nú aftur ætlaði at leggja sama uppskot fram, er at undirmeta miðflokkin. Tá skrivaðu vit til Løgmann og vístu á, at tað tóku vit ikki undir við. Løgmaður kallaði so til samgongufund. Talan var um ein stuttan og ógvuliga friðaligan samgongufund, sum endaði við at Bjarni Djurholm ásannaði, at meiriluti var ikki fyri at geva skeinkiloyvi til ávís tiltøk og tí var tann aprturin tikin burturúr uppskotinum, sum Bjarni Djurholm síðani legði fram.

Skuldi tað bera til at fáa skeinkiloyvi til ávís tiltøk, hevði tað blivið ein vinnuvegur í sær sjálvu mat ferðast runt at skonkt ymsastaðni og tað hevði skjótt farið á glið, so tað vildu vit ikki taka undir við, sigur Jenis av Rana.